**EIN LÍTIÐ BRÚKT**
Umarex sportwaffen luftpistól 4,5 mm, til sølu fyri 1.500 kr. Brúkar CO2 trýstfløskur. Slíri fylgir við.
*Tlf. 509969*

**FERÐASEÐIL**
til Keypmannahavn retur til Føroyar til sølu fyri kr. 1.800,- frá 23. juni til 8. juli 2005.
*Tlf. 226067*

**KLÆÐIR**
Sagt verður frá, at frá 1. juni til 1. september verður ikki tikið ímóti klæðum, skóm o.t.
*Reyði Krossur Føroya*

**RADIATORUR**
Ein 3,20 m. langur og 0,50 m. høgur, dupultur radiatorur til sølu.
*Tlf. 443187*

**256 MB CF KORT**
Eitt Kingston CF kort, Pláss er fyri nógvum myndum í høgari góðsku. Passar til IXUS 500 o.l. kamera. Verður selt sum auktión við byrjunarboðið 200,- á www.keypsla.com
*tlf. 255909 / ahh@kallnet.fo*

**EFTIRLÝSING**
Eigur nakar bindobókina 215 sjalmynstur (Olivia Joensen) Forlagið Úti á Bø útgivið at selja mær?
*Tlf. 229816*

**VINDEYGU 80 x 60 CM – HASTAR**
Er tað nakar, sum kann selja okkum hesi – ca. mát.
*Tlf. 317686*

**GOGGUR TIL SØLU**
Goggur fáast bíliga til keyps.
*Tlf. 210607*

**HEY**
Er tað nakar, ið ætlar sær niður til Århus at lesa í heyst? vinarliga sms til mín.
*Tlf. 224370 Lena*

**GONGUBAND TIL SØLU**
Lítið brúkt til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 723777*

**HONDVEKTIR TIL SØLU**
Eitt lekkurt sett av hondvektum, av merkinum Energizer til sølu. Tvær stengur við gummi haldi og 18 kg. ískivum. Nýprísur 600 kr, til sølu fyri 350 kr.
*Tlf. 0045 28398549*

**GULL UR**
Merki: Oskar Emil (Caesium) mannfólka ur. Sera flott u r við hvítari skivu. Er eitt ára gamalt. Vanligur prísur 8.000 kr. selist fyri 3.000 kr. (má síggjast).
*Tlf. 214163*

**FJARSTÝRDUR BÁTUR**
Eg havi ein GRAUPNER WIESEL torpedobát sum eg ynski at selja. Báturin er 107 cm langur, hevur 2 motorar og er sera flottur! Báturin selist við akumolatori og fjarstýring. Prísur 5.600 kr.
*Tlf. 214163*

**FRANKARÍKI - FØROYAR 3. SEPT.**
um tú hugsar um at koma við 12. manni til París, so er at melda teg til nú. Vit hava ikki nógv pláss eftir. Les meir um túrin á: www.mb.fo. ring til MB-Tours og melda teg á tlf. 322121.
*12. maður*
*www.footballsupporters.fo*

**LOPPUMARKNAÐUR**
Og køkutombola verður í KFUM í Havn leygardagin 11. juni 2005 kl. 10.00. Vit taka fegin móti lopputingum. Hjartaliga vælkomin oman í
*KFUM Varðagøta 9*

**TIL SØLU**
Cal. 12 Browning silver 1/2 automat, svart plast skefti, væl viðfarin. Prísur 5.000,-
*Tlf. 314111*

**MATR. NR. 4A NES-VÁGUR**
5100 $m^2$ innangarðs 1 Gl. 10 sk. Neshagi 1. partur verður selt um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 573659*

**EFTIRLÝSING**
Í samband við at hondbóltsfelagið Kyndil fyllir 50 ár 10. mars 2006, er ætlanin at geva út 50 ára minnisrit, sum lýsir søgu felagsins. Tí vilja vit hervið heita á fólk, sum liggja inni við forvitnisligum myndum, búnum o.l. um at venda sær til Kyndil á
*Tlf. 210298 ella 274344*

## HEILSANIR



**Góða Gyðja**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 7. juni.
**Ynskja omma og abbi í Nólsoy**





**Góða Jónleyg og Helena**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 6. og 9. juni. Guds ríku signing í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba, omma og abbi**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskir hon sjálv í Írlandi**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ____________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ____________________
Bústaður: ____________________
Bygd/býur: ____________ Tlf.: ________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

# Drunnhvíti kring allan heimin

**Postverkið hevur í vikuni givið út fýra nýggj frímerki, har myndevnið er drunnhvíti**



Í frágreiðing til útgávuna verður greitt eitt sindur frá hesum fuglinum, sum í størstan mun heldur til í Nólsoy.

Drunnhvítin (hydrobates pelagicus) er sera tevsamur, og hjálpir tað honum at finna föðsluna og um náttina reiðrið, tá ið hann kemur inn aftur av havi. Á landi sæst hann bert á reiðurstaðnum, ið vanliga er í onkrari urð.

Drunnhvíti er svartur um allan kroppin uttan á drunninum. Hann er hvítur, so fuglurin ber navnið við sær.

Drunnhvíti er sum grátítlingur til stöddar og er millum minstu fuglar, ið liva úti á havi. Hann er 16 cm til longdar, flogið er 37 cm og hann vigar um 27 g.

Drunnhvíti eigur ymsastaðni í Föroyum, tó mest í Urðini í Nólsoy. Summir meta, at ongastaðni í heimi er so nógvur drunnhvíti til sum har. Útbreiðsla hansara er millum Lofot, Ísland og Skotland.

Her í Föroyum eru um 30.000 drunnhvítar ringmerktir, og vita vit tí, at teir halda til á havinum uttanfyri Suðurafriku.

### Mat á náttartíð

Hjá drunnhvítum er árliga gongdin tann, at fyrstu fuglarnir koma higar seinast í mai. Í juli - avgust verpa teir reiðiliga stórt, hvítt (og brúnblettut) egg (um 7 g), sum teir böla í góðar 5 vikur.

Pisan fær föði hvörja nátt í uml. sjey vikur og gerst so spikafeit. So rýma tey gomlu, og millum átta og tólv dagar seinni er hon lætnað so mikið, at hon sleppur á flog og kann halda leið sína suður um Afriku.

Tvey ár seinni kemur hon aftur og fer at reiðrast trý til fýra ára gomul.

### Sýldi drunnhvítin

Sýldi drunnhvítin er góðan mun störri enn hin og er eyðkendur av tí, at hann hevur sýlt vel. Longdin er 21 cm, flogið 46 cm og hann vigar um 45 g.

Sýldi drunnhvítin eigur, tað menn vita, bert í Mykinesi og á Mykineshólmi (og á Tröllhövda?), einir tvey til trý túsund í tali. Á okkara leiðum livur hann í ökinum millum Noreg, Ísland og Skotland. Tó er mest til av honum í Nýfundlandi. Menn halda, at hann um veturin heldur til vestan fyri Afriku (havöki vestanfyri Dakar og suðureftir).

Hjá sýldum drunnhvítum er árliga gongdin tann, at fyrstu fuglarnir koma higar seinast í apríl í holuna, teir hava grivið sær.

Í mai verpa teir stórt, hvítt egg (11 g), sum teir böla í seks vikur. Pisan fær mat hvörja nátt í útvið níggju vikur og gerst so spikafeit, at hon fær ikki flogið.

Tey gomlu rýma frá henni, og átta til tíggju dagar seinni er hon lætnað so frægt, at hon sleppur á flog, og ferðin suðureftir kann byrja. Tvey til trý ár seinni kemur hon aftur og fer at reiðrast eini fýra til fimm ára gomul.